

**TOYOTA COROLLA 1,9D TERRA SEDAN**

**Skrásetingarnr.:** AG 716 **KM:** 101.000
**Árgangur:** 26.04.00 **Seinast sýnaður:** 26.10.05
Sentrallás - Radio/CD - Boardcomputer - El-rútar framman El-spegl
**Útgjald kr. 27.510,-** **Kr. 78.000,-**



**TOYOTA COROLLA 2,0 TERRA D-4D** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** MN 901 **KM:** 74.000
**Árgangur:** 07.05.03 **Seinast sýnaður:** 07.05.03
Fjarstýrt sentrallás - Elrútar/spegl - Boardcomputer - Radio/CD
**Útgjald kr. 49.680,-** **Kr. 165.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1,6 L/B**

**Skrásetingarnr.:** PN 196 **KM:** 73.000
**Árgangur:** 27.01.99 **Seinast sýnaður:** 17.02.04
**Útgjald kr. 25.040,-** **Kr. 62.000,-**



**TOYOTA YARIS 1,0 H/B TERRA V/KOMF** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** FK 106 **KM:** 50.000
**Árgangur:** 06.10.04 **Seinast sýnaður:** 06.10.04
Fjarstýrt sentrallás - Elrútar/spegl - Boardcomputer - Radio/CD
**Útgjald kr. 37.080,-** **Kr. 123.000,-**



**TOYOTA CAMRY 2,2 XL AUT**

**Skrásetingarnr.:** MF 094 **KM:** 198.500
**Árgangur:** 13.07.95 **Seinast sýnaður:** 17.02.05
Sentrallás - Elrútar aftan og framman - Radio/bandsp.
**Kr. 69.000,-**



**DAEWOO NUBIRA 1,6**

**Skrásetingarnr.:** GF 462 **KM:** 52.000
**Árgangur:** 12.11.01 **Seinast sýnaður:** 17.09.04
**Útgjald kr. 18.780,-** **Kr. 62.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2,0 SOL STW** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** RN 921 **KM:** 93.000
**Árgangur:** 12.11.03 **Seinast sýnaður:** 09.05.05
Fjarstýrt sentrallás - 2 zone klima - Radio/Cd/band - "antispin" VSC - Regnsensor - Hiti í setrum framman - Elrútar/spegl o.m.a.
**Útgjald kr. 74.280,-** **Kr. 247.000,-**



**SEAT CORDOBA 1,9 SDI**

**Skrásetingarnr.:** LD 984 **KM:** 181.000
**Árgangur:** 02.12.99 **Seinast sýnaður:** 02.02.06
**Útgjald kr. 23.440,-** **Kr. 58.000,-**



**TOYOTA AVENSIS VERSO MPV 7 PERS.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** MD 618 **KM:** 130.000
**Árgangur:** 12.05.03 **Seinast sýnaður:** 31.01.05
Fjarstýrt sentrallás - Automatisk aircondition - Radio/CD Elrútar/spegl
**Útgjald kr. 67.680,-** **Kr. 225.000,-**



**SSANGYONG MUSSO 4X4 STW.**

**Skrásetingarnr.:** ES 183 **KM:** 104.000
**Árgangur:** 18.12.97 **Seinast sýnaður:** 26.05.05
**Kr. 58.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

**6 mánaða garanti**

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

**REYNI SERVICE** P/F

Fyrivarni ver ur tikið fyri møguligum prentvillum.


# Rock Amadour seldur í Vági

**Partafelagið Moyggjartúgva í Vági hevur selt trolaran Roc Amadour, men skipið verður verandi í Vági**



*Roc Amadour er nú sledur til felagið Moyggjartúgva*

**SKIPASØLA**
*Árni Joensen*

Tað er eitt felag í Vági, sum hevur keypt Roc Amadour, men stjórin, Hallur Augustinussen, er sera fáorðaður um keypið.

– Eg kann vátta, at vit yvirtóku skipið seinasta leygardag, men fleiri viðmerkingar havi eg ikki, sigur Hallur Augustinussen. Hann vil tískil heldur einki siga um, hvat skipið er keypt fyri.

Roc Amadour, sum er bygdur í Fraklandi í 1973, kom til Føroya í 1981 og hoyrdi heima á Strondum. Eitt skifti áttu fuglfirðingar trolaran, og tá royndi hann millum annað eftir búrfiski sunnanfyri.

Tey seinnu árini hevur Roc Amadour roynt á djúpum vatni við Føroyar, og tað fer hann eisini at gera - fyri fyrst ið hvussu er, sigur Hallur Augustinussen.

Partafelagið Moyggjartúgva, sum nú hevur selt Roc Amadour, eigur eisini djúpvatnstrolaran Sancy.

## Fingu eitt gott tilboð

Roc Amadour bleiv seldur í Vági fyri at varðveita skipið í økinum, sigur seljarin, sum tó ásannar, at teir hava selt tað betra skipið hjá felagnum.

Hóast tað hevur gingið væl hjá trolaranum Roc Amadour, valdi reiðaríið, P/F Moyggjartúgva, at selja einum øðrum felagí í Vági skipið fyri einari viku síðani.

Mikkjal Sørensen, stjóri í P/F Moyggjartúgvu, sigur við Portalin, at teir fingu eitt gott boð upp á Roc Amadour, og at teir gjørdu av at selja.

– Á tann hátt kundu vit varðveita skipið í økinum, sigur hann.

Mikkjal Sørensen ásannar, at tað hevur gingið væl hjá Roc Amadour, meðan tað hevur gingið minni væl hjá Sancy, sum P/F Moyggjartúgva eisini eigur. Roc Amadour hevur givið pengar av sær, meðan Sancy hevur kostað felagnum pengar, sigur hann. Eitt nú mátti reiðaríið rinda fleiri hundraðtúsund krónur fyri at fáa skipið úr Íslandi, eftir at íslendska sjóverjan tók tað herfyri.

– Men vit hildu tað kortini vera rætt at selja Roc Amadour, nú vit fingu eitt góð boð upp á hann, sigur stjórin.

Sancy liggur í løtuni, tí ymiskt er at gera við skipið.




AVGREIÐSLUFÓLK TIL FØROYA BANKA

**Vit leita eftir jaligum og fyrikomandi starvsfólki, til avgreiðsluøkið í Tórshavn. Tú brennir fyri at geva kundum okkara eina góða tænastu og uppliving, sum fær tey at kenna seg vælkomin.**

## Arbeiðsøkið
Sum avgreiðslufólk í einum dynamiskum umhvørvi, kemur tú at arbeiða við:

- Kassaavgreiðslu
- Peningaflytingum
- Uppteljing og eftirliti við náttarboksum
- Øðrum fyrifallandi arbeiði

## Førleikakrøv
Vit vænta at tú:

- Hevur peningastovns- ella skrivstovuútbúgving, hetta er tó ongin treyt
- Setur kundan í miðdepilin og er tænastusinnað/ur
- Arbeiðir effektivt og smidliga
- Hevur góðar samstarvseginleikar og dámar at arbeiða bæði sjálvstøðugt og í toymum
- Ert lagalig/ur og opin fyri nýggjum avbjóðingum
- Ert hjálpsom/samur og dugir at skapa álit
- Ert í góðum lag - eisini tá nógv er at gera

Vit leggja stóran dent á at reka álitandi peningastovnsvirksemi, at starvsfólk eru í góðum lag og vænta, at tú gevur títt ískoyti til eitt gott arbeiðsumhvørvi.

## Løn og setanarviðurskifti
Verða avtalað nærri sambært tíni útbúgving og royndum.

## Meira kunning
Meira fæst at vita um starvið við at seta teg í samband við leiðaran fyri Deild Tórshavn, Niels A. Joensen á tlf. 31 13 50, teldupostur niels.joensen@foroyabanki.fo.

## Umsókn
Send tína umsókn við CV til Føroya Banka, Húsagøta 3, FO-100 Tórshavn, att: Bjarki Mohr, ella á teldupost starvsfolk@foroyabanki.fo áðrenn 21. juli 2006.

REPROZ

FØROYA BANKI
100 ár – yngri enn nakrantíð